Tórshavnar musikkskúli

| Lesiætlan | Gittar | Rútmisk deild |
| --- | --- | --- |

# Musikkskúla Miðnám

**Endamál**

1. At næmingarnir náa eitt spælitekniskt og listarligt støði, sum svarar til upptøkukrøvini til konservatorium ella til annan líknandi hægri tónlistalærustovn. Undirvísingin kan í ein vissan mun lagast til upptøkukrøvini til ein ávísan tónlistalærustovn.
2. At menna førleikan hjá næmingunum at arbeiða sjálvstøðugt og at spæla á teirra ljóðføri við ein persónligum framburði á einum stílistiskt breiðum grundarlagi.

## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**

Umsøkjarin spælir 2 stykkir við ymsum huglagi. Í minsta lagi skal annað stykki verða við rútmubólki og í minst øðrum skal vera improvisatión.
Skúlin kann útvega rútmubólk, men umsøkjarin kann hava sínar egnu tónleikarar við.

**Prima vsita – secunda vista**

Prima vista: Eitt stykki sum byrjar lætt, men endar við vaksandi torleikastøði sum t.d. http://dl.dropbox.com/u/1339123/SekundaVista.pdf
Talsetingarnir og nótarnir verða spældir hvør fyri seg

**Tónastigar o.a.**

Tónastigar: dur- og mollstigar við upp til 2 forteknum, tvær oktavir
Imitation og spæla eftir oyranum (gehør).
Royndin tekur uml. 20 min, við meting.

# 1. ársroynd

**Tónleikaverk**

Næmingurin spælir minst 2 stykkir við ymiskum huglagi. Í minsta lagi eitt av stykkjunum verður framført við rútmubólki. Næmingurin skal improvisera í minst einum av stykkjunum.

1. Eitt stykki við improvisatión yvir eitt harmoniskema, torleikastøði áleið eitt lætt "standard" nummar ella ein einfaldur bluesformar (tað er ikki krav at tað skal vera eitt standard nummar, men kann eisini vera eitt originalt nummar)
2. Og/ella eitt sjálvvalt stykki við improvisatión. Tað er frítt at velja stílslag og kann vera spælt saman við øðrum tónleikarum ella ikki, ella tað kann vera frí improvisatión.
3. Og/ella eitt innlært stykki, sum kann vera úr klassika repertoirinum ella øðrum.

**Secunda vista**

- Næmingurin spælir eitt ókent stykki, sum inniheldur melodi og besifringar. Fyrst verður melodiur spældur, síðani akkordir eftir besifringum.

**Improvisatión**

- Næmingurin improviserar yvir akkordirnar í stykkinum.

**Tónastigar o.a.**

- Næmingurin greinar, hvørjar skalar hann/hon brúkar til akkordirnar. Eisini verður spurt um skalar og arpeggios.

# 2. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin spælir minst 2 stykkir við ymiskum huglagi. Í minsta lagi eitt av stykkjunum verður framført við rútmubólki.

1. Eitt stykki við improvisatión yvir eitt harmoniskema, torleikastøði áleið eitt miðal torført "standard" lag (tað er ikki krav, at tað skal vera eitt standard lag, men kann eisini vera eitt originalt lag)
2. Og/ella eitt sjálvvalt stykki við improvisatión. Tað er frítt at velja stílslag og kann vera spælt saman við øðrum tónleikarum ella ikki, ella tað kann vera frí improvisatión.
3. Og/ella eitt innlært stykki, sum kann vera úr tí klassiskum repertoirinum ella øðrum.

## Secunda vista

- Næmingurin spælir eitt ókent stykki, sum inniheldur melodi og besifringar. Fyrst verður melodiur spældur, síðani akkordir eftir besifringum.

## Improvisatión

- Næmingurin improviserar yvir akkordirnar í stykkinum.

## Tónastigar o.a.

- Næmingurin greinar, hvørjar skalar hann/hon brúkar til akkordirnar. Eisini verður spurt um skalar og arpeggios.

# 3. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin spælir minst 2 stykkir við ymiskum huglagi. Í minsta lagi eitt av stykkjunum verður framført við rútmubólki.

1. Eitt stykki við improvisatión yvir eitt harmoniskema, torleikastøði áleið eitt miðal torført "standard" lag (kann eisini vera eitt originalt lag)
2. Eitt sjálvvalt stykki við improvisatión. Tað er frítt at velja stílslag og kann vera spælt saman við øðrum tónleikarum ella ikki, ella tað kann vera frí improvisatión.
3. Eitt innlært stykki, sum kann vera úr tí klassiskum repertoirinum ella øðrum.

## Secunda vista

- Næmingurin spælir eitt ókent stykki, sum inniheldur melodi og besifringar. Fyrst verður melodiur spældur, síðani akkordir eftir besifringum.

## Improvisatión

- Næmingurin improviserar yvir akkordirnar í stykkinum.

## Tónastigar o.a.

- Næmingurin greinar, hvørjar skalar hann/hon brúkar til akkordirnar. Eisini verður spurt um skalar og arpeggios.

**Repetoire**

Jassballadur
Bebop/standard í medium og up tempo
Blues, einfaldar og víðkaðar bluesformar
Suðuramerikanskur tónleikur (Bossa nova, samba o.s.fr..)
Afrocubansk 6/8
Vals
Reharmonisering av kendum løgum
Funk/rock/fusion/pop o.a.
Heilt frítt improviseraður tónleikur, møguliga sum partur av einum øðrum lagi, t.d. sum ein ingangur (intro)
Innlærd stykkir uttan improvisatión (sum var tað eitt klassiskt verk)
Walking-bas við og uttan akk

**Prima vista/sekunda vista**

Noder og becifring

**Tónastigar**

Allar skalar, vit vanliga brúka:
Kirkjutónastigar, melodiskan og harmoniskan moll við teimum vanligu viðvendingunum 8-tónastigar, heiltónastiga, augmenteraður og kromatiskurt

**Harmonik**

Duga harmonisku skipanina.
Trintalsbecifring við tilhoyrandi tónastigum.
Høgt bygdar akkordir Harmoniskar gongdir (progressiónir). Modalan harmonik.
Blokakkordir (drop 2)

**Improvisatión**

Improvisatión yvir harmoniir: funktiónsharmonik, modulbygdan harmonik, ”rhytm changes” møguliga ” Coltrane changes”
Modal improvisatión: diatonisk ,”outgoing” improvisatión
Frí improvisatión: yvir tema, hugløg (stemningar)

**Gehør**

Improvisera yvir fyrispældar harmonier, kanska rubato, imitatión.